

Gullfaks C. Mynd: Harald Pettersen.

# Noreg: Øll missa ikki arbeiðið álíkavæl

Deil:



**Jógvan Hugo Gardar**

24.10.2014 - 11:19

Oljan.fo

Norska fyritøkan Bilfiger, ið hevur fleiri størri uppgávur í oljuvinnuni, boðaði herfyri at tey noyddust at siga 600 starvsfólkum úr starvi, tí virksemi í norsku oljuvinnuni minkar so nógv.

Hetta er bara ein av fleiri fyritøkum sum gera uppgávur fyri oljuídnaðin, ið hava boða frá niðurskurði, og at fólk fara at missa arbeiðið í vinnuni.

Nú skrivar NRK at fyritøkan álíkavæl ikki skal siga øllum 600 úr starvi. Fyribils sleppa 100 at halda fram, so talið á uoosøgdum er avmarkað til umleið 500. Orsøkin er at Bilfiger hevur fingið nýggjar langtíðarsáttmálar í oljuvinnuni, millum annað við Statoil.